Ingilín Didriksen Strøm **Nr. 70/2019**
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur viðvíkjandi vinningsbýti, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a).

1. Hvussu nógvan pening hevur TAKS móttikið í vinningsbýtisskatti í ávikavist 2016, 2017 og 2018?
2. Hvussu nógvan pening hevur TAKS endurrindað fyri skatt av vinningsbýti í ávikavist 2016, 2017 og 2018, og eftir hvørjum reglum varð hesin peningurin endurrindaður ?
3. Hvussu nógvur peningur er endurrindaður útlendskum ognarluti í ávikavist 2016, 2017 og 2018?
4. Hvussu nógvan pening fekk landskassin inn fyri skatt av vinningsbýti í 2002, sum er fyrsta árið eftir, at lóg um skatting av kapitalvinningi varð viðtikin?
5. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at seta tiltøk í verk til tess at tryggja sær, at ein størri partur av vinningsbýtisskattinum kemur í landskassan?

Viðmerkingar
Seinastu tíðina hevur ljós verið varpað á útlendskan ognarlut í føroysku vinnuni. Spurningurin verður settur fyri at fáa greiðu á, hvussu nógvar skattakrónur verða afturbornar útlendskum eigarum, millum annað orsakað av tvískattaavtalum.

Tá ið lóg um skatting av kapitalvinningi varð sett í gildi 21. desember 2001, merkti tað, at partabrøv, sum vórðu keypt áðrenn 2001, vórðu undantikin nýggju ásetingarnar. Í tí sambandi ynskir spyrjarin at fáa upplýst, hvørjir bólkar eru frítiknir at rinda vinningsbýtisskatt, umframt hvussu nógvur peningur kom í landskassan eftir, at lóg um skatting av kapitalvinningi varð sett í verk. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 21. apríl 2020

Ingilín Didriksen Strøm